**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøð-ingur B4

Á barnadeildini **B4** er eitt avloysarastarv á brøk 0,7 í skiftandi vaktum leyst at søkja frá 1. juni 2005 og til og við 31 mai 2006.

B4 er ein barnadeild við 13 plássum fyri børnum í aldrinum 0 - 14 ár. Á deildini starvast sjúkrarøktar-frøðingar, sjúkrahjálparar, pedagogur og barna-læknar.
Áhugaverdar avbjóðingar liggja fyri framman, ætlanin er m.a. at B4 flytur upp á B5 og at deildin verður pilotdeild í samband við THS (Talgild Heilsu Skipan).

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøð-ingur
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan røkt og viðgerð av børn-um

**Fyrimun** hava umsøkjarar við klinskum royndum innan økið.

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur við nógvum av-bjóðingum

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til Tove Thomsen, deildarleiðara, telefon 304500, lokal 6004 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktar-frøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggj-armálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 29. mars 2005 kl.12.00.

**Skivlig umsókn** merkt "umsókn til starv" við CV, avrit av prógvum, autorisatión, viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

# Fróðskaparsetrið søkir eftir telduvørði

**Telduvørður**
Av tí at telduvørðurin hjá okkum fer víðari til aðrar avbjóðingar, søkja vit eftir telduvørði at byrja skjótast til ber.

Telduvørðurin hevur ábyrgdina av, at teldurnar virka nøktandi í dagliga arbeiðinum, og at data verða goymd og brúkt á skilabesta hátt. Vit rokna við, at tú hevur royndir við teimum vanligastu KT-forritunum og ert vanur at vegleiða brúkarar í nýtsluni av teimum. Tú hevur viðkomandi út-búgving ella starvsroyndir, ert íðin og hevur áræði og góð samstarvsevnir.

Dagliga arbeiðið hjá telduvørðinum fevnir millum annað um at
- seta upp og innleggja Windows og Linux stýriskipanir á brúkarateldir
- innleggja nýtsluforrit (Office pakkan, Novell Netware klient og Novell GroupWise klient)
- taka trygdaravrit og at endurskapa dáta á lokalum ambætarum og teldum
- innleggja brúkaraskipanir á deildunum
- viðlíkahalda brúkarateldur, so at frammanfyri nevndu forrit virka

Ein stórur partur av arbeiðinum verður framt á teimum ymsu deildunum á Fróðskaparsetrinum.

**KT-økið**
KT-økið fevnir um Windows- og Linuxskipanir á brúkarateldum, Novell Netware netskipan og Novell GroupWise postskipan. Umsøkjarar við hollum kunnleika til hesar skipanir hava fyrimun. Høvuðsbrúkarabólkarnir eru granskarar, undir-vísarar, fyrisitarar og studentar.

**Treytir og umsóknir**
Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært av-talu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Nærri upplýsingar um starvið og um arbeiðsuppgávurnar kunnu fáast við at venda sær til Hans Birgir Højgaard, KT-leiðara á telefon 352570 ella teldupost: birgirh@setur.fo

Umsóknir við prógvum, ævisøgu (CV) og møgu-ligum viðmælum skulu stílast til Setursskrivstov-una í seinasta lagi 30. mars 2005. Starvið verður sett skjótast til ber

**Setursskrivstovan**
**J.C. Svabosgøta 14**
**Postrúm 272**
**FO-100 Tórshavn**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 2367,** P/F Grunningur, 490 Strendur

**Viðtøkur broyttar:** 01.03.2005.
**Nýtt navn:** P/F Stubbin
**Nýggj hjánøvn:** P/F Stubbin Camping (P/F Stubbin), P/F Stubbin Marine (P/F Stubbin) og P/F Grunningur (P/F Stubbin)
**Nýggjur heimstaður:** Kvívíkar Kommuna.
**Nevnd:**
**Farin frá sum formaður:** Remy Gaardlykke Hansen, Miðrás 6, 100 Tórshavn
**Innkomin í nevndina sum formaður:** Anna Sofía Vilhelmsdóttir, Norðuri á Heygum, 340 Kvívík.
**Farin úr nevndini:** Sanna Hansen, Hveensvej 27, 3th., DK-2300 København S.

Skráseting Føroya
tann 4. mars 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 1542,** P/F Heðin Zachariasen, 435 Streymnes.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Anna Maria Paulina Zachariasen, 435 Streymnes (formaður), Hjørleif Zachariasen, 435 Streymnes og Heðin Súni Zachariasen, 435 Streymnes.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Heðin Súni Zachariasen, 435 Streymnes.

Felagið er tann 10.02.2005, farið í likvidatión við Christian Andreasen, advokati, Fr. Petersensgøta 9, Box 6, 110 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya
tann 4. mars. 2005.

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3915**
**Navn:** Sp/f Djurhuus
**Adressa:** 800 Tvøroyri

**Kommuna:**
Froðbiar Kommuna
**Stovningardato:** 15.02.2005
**Viðtøkudato:** 15.02.2005
**Kapitalur:** Kr. 90.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 90.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Ólavur Djurhuus, 800 Tvøroyri og Marius Joensen, 800 Tvøroyri.
**Stjórn:** Ólavur Djurhuus, 800 Tvøroyri.
**Tekningarreglur:**
Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
**Grannskoðari:**
P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:**
01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:**
15.02.2005 - 31.12.2005
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og reka fiskiskip.

Skráseting Føroya
tann 2. mars 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3173,** P/F Faroe Real Estate Ltd., 410 Kollafjørður.

**Viðtøkur broyttar:**
31.01.2005.
**Kapitalur:**
Hækking við kr. 14.648.950,00 til kr. 44.172.950,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 14.648.950,00 til kurs 100,00717.
Lækking við kr. 27.272.950,00 til kr. 16.900.000,00 til rindan av halli.

Skráseting Føroya
tann 2. mars 2005

Kristin Balle

---

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 1825,** P/F Griffilin, 100 Tórshavn.

Viðtikið 10.02.2005 at lækka partapeningin við kr. 90.000,00 til kr. 810.000,00 til kurs 100 til annulatión av egnum partabrøvum eftir at proklama er runnið.

Skráseting Føroya
tann 2. mars 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 2451,** P/F Miðstøðin, 650 Toftir.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:**
Johannus M. Olsen, 655 Nes, Eysturoy.
**Innkomin í nevndina:** Jens Jacob Olsen, 650 Toftir.

Skráseting Føroya
tann 4. mars 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 620,** P/F Tannlæknastovan í Hvalvík, 430 Hvalvík.

Viðtikið 26.01.2005 at lækka partapeningin við kr. 300.000,00 til kr. 500.000,00 til kurs 133 við útgjalding til partaeigarar eftir at proklama er runnið.

Skráseting Føroya
tann 2. mars 2005

Kristin Balle